


# EG STÚRI FYRI

**HANDILIN** - Tað er bara hugurin sum ger tað, at eg framvegis eri her í handlinum, sigur 83 ára gamli Eivind Petersen, handilsmaður í Oyndarfirði. - Eg gleði meg at fara til arbeiðis hvønn einasta dag. Tað er í øllum førum ikki nakað sum eg stúri fyri.

Tekstur: Snorri Brend
Myndir: Jens Kristian Vang

Klokkan er ikki meiri enn farin av níggju henda regntunga mikumorgunin í farnu viku.

Eivind hevur longu verið í handlinum eina løtu, tí í dag veit hann av royndum, at nýggj vøra kemur úr Havnini - hesaferð frá heilsøluni hjá Poul Michelsen.

Kvikliga hevur Niels Jacob frá PM Heilsøluni sett vøruna á eitt rulliborð. Líka so kvikliga tekur tann royndi og væl-til-árs-komni handilsmaðurin tær, og byrjar beinanvegin at seta mjólkina í kølaran og at prísa tað sum prísast skal.

Sum við øllum øðrum størvum hevur ein í 69 ár bæði upplivað góðar búskaparligar tíðir og minni góðar búskaparligar tíðir. Hetta hevur kortini ikki nervað Eivind í arbeiði sínum.

– Tað er sjálvandi eitt sindur strævið at hava ein handil á bygd. Man kundi jú altíð ynskt at sølan var størri, sigur hann álvarsamur.

– Tað vísir seg tíverri at vera so, at fólk keypir ov nógv burturi.

## 14 ára gamal

Hóast Eivind er farin langt upp um eftirlønaraldur, fer hann framvegis hvønn Guds skapta dag glaður og hugaður til arbeiðis.

– Eg kenni faktist ikki til annað, sigur gamli handilsmaðurin. - Eg byrjaði longu her sum 14 ára gamal.

Seinastu 69 árini hevur hetta tí verið hansara gongd: Til arbeiðis hvønn morgun og síðani heim aftur á kvøldi.

Men tá hann so er komin heim, so er hann komin heim.

– Ja, tað er ein kunstur. Men henda kunstin havi eg tíbetur lært, sigur hann, sum saman við einum av synum sínum rekur einasta handilin í heimbygdini.

> **Tá ein fer til hús eftir loknan arbeiðsdag, so skal man ikki taka arbeiðið heim við sær - hvørki í høvdinum ella við pappírum. Um eg setti meg at spekulera uppá handilin tá, so hevði eg jú arbeitt altíð. Og tað kann einki menniskja halda til í longdini**

## Bara handil

Tað vóru tíðir, tá tað vóru fleiri handlar í bygdini.

Hesin handilin byrjaði fyri skjótt 150 árum síðani, og hevur síðani verið á skiftandi hondum. Millum hesar teljast ein sum kallaðist Jóan Pauli úr Vestmanna og sum hevði handilin frá 1880'unum til hann doyði í 1942, tá beiggi Eivind keypti handilin.

> **Eg trívist sjálvur sera væl her og gleði meg hvønn dag at kunna sleppa til arbeiðis. Faktist stúri eg fyri tí degnum, tá eg ikki longur kann fara í handilin**

Hetta var somuleiðis sama árið sum Eivind byrjaði í handlinum sum bert 14 ára gamal. Og tá beiggin seinni flutti til Danmarkar, tók Eivind yvir handilin - og her er hann enn, og hevur ongar ætlanir um at setast hendur í favn. Fyri 30 árum síðani fluttu teir í hetta handilshølið, her teir nú eru.

– Nei, hugurin at arbeiða hevur altíð verið góður. Eg havi ongatíð verið til skips ella gjørt annað hesi árini, men havi stórtrivist í handlinum. Og tað geri framvegis.

## Stúri

Í dag er gongdin hon, at fleiri av smærru bygdarhandlunum hava trupult við at klára seg í kappingini við teir stóru.

Eivind fylgir sjálvandi væl við, hvønn prís ið aðrir handlar hava. Men hann letur seg ikki ávirka av tí.

– Fólk vita hvat eg havi, og eg havi bara mínar føstu prísir. Tað verður so ikki broytt, slær hann fast.

Hann roynir í sínum lagi at fáa handilin at bera seg við rímiligum prísum, vinsælum umhvørvi og góðari tænastu.

– Eg trívist sjálvur sera væl her og gleði meg hvønn dag at kunna sleppa til arbeiðis. Faktist stúri eg fyri tí degnum, tá eg ikki longur kann fara í handilin.

*snorri@sosialurin.fo*